norden

Nordplus Vaksin

# Stuðul frá Nordplus – Vaksin

Nordplus vaksin er ætlað at menna samstarvið fyri fólksliga upplýsing og undirvísing av vaksnum.

Stuðul verður veittur til flytføris- og samstarvsverkætlanir, sum kunnu menna nýggj hugskot, háttaløg (metodur), tilfeingi, partar av skeiðum o.tl. Bæði luttakarar og lærarar kunnu vera við í samstarvinum. Harafturat verður stuðul veittur til at kunna um royndir hjá hvørjum øðrum, til kortlegging og útgreining av ávísum økjum og til at byggja nýggj netverk upp.

- Stuðul kann t.d. verða veittur til fyrireikingar til verkætlanir at fyrireika vitjan hjá undirvísarum og øðrum við ábyrgd fyri frálæru.
- Stuðul kann verða veittur til uppihald í samband við eftirútbúgving, lestur ella undirvísing hjá lærarum og øðrum og til skifti millum luttakarar í fólkaupplýsing og í undirvísing fyri vaksin.

**Málbólkurin fyri Nordplus Vaksin er:**

- Stovnar, sum arbeiða við læru fyri vaksin.
- Fólkaupplýsing og vaksnamannaútbúgving, bæði almennar útbúgvingar, yrkisútbúgvingar og serundirvísing.
- Sjálvbodnir felagsskapir og feløg.

**Umsóknarfreistin til Nordplus Vaksin er 1. oktober 2006**

*Umsóknarfreistirnar til hinar Nordplus-skipanirnar eru:*

**Nordplus Junior** Umsóknarfreist: 15. mars 2007

**Nordplus Mál** Umsóknarfreist: 16. okt. 2006

**Nordplus** Umsóknarfreist: 1. februar 2007

**Meira fæst at vita á www.ciriusonline.dk/nordplus-voksen ella hjá Altjóða Skrivstovuni í Tórshavn. Tlf. 322065 · e-mail: ask@ask.fo · www.ask.fo**



norden

Nordplus Mál

# Stuðul frá Nordplus – Mál

**Nordplus Mál skal menna málfatanina og málfelagsskapin millum norðurlondini og styrkja altjóða støðuna hjá málunum.**

Nordplus Mál er ein skipan, sum er ætlað at vísa á týdningin av, at tey norðurlendsku málini verða styrkt, soleiðis at norðurlendskt samstarv eisini í framtíðini verður á norðurlendskum málum.

Stovnar, feløg og persónar kunnu søkja um stuðul til tiltøk og verkætlanir, sum fremja fatanina av norðurlendskum málum.

**Í 2007 verða hesi øki raðfest:**

- Átøk, sum styrkja um støðuna hjá norðurlendsku málunum
- Tiltøk, sum hjálpa til at skilja grannamál
- Tiltøk, sum styrkja um kunnleikan hjá norðurlendingum til finsk og onnur ikki skandinavisk mál
- Samstarv og menning innan máltøkni

**Stuðul verður latin til hesi endamál:**

- Skeið og ráðstevnur
- Gransking og kanning
- Orðabóka- og terminologiarbeiðið
- Undirvísingartilfar og útgávur
- Máltøkni verkætlanir
- Uppbygging av netverkum við denti á mál og á upplýsingararbeiðið

**Umsóknarfreistin til Nordplus Mál er 16. oktober 2006.**

*Umsóknarfreistirnar til hinar Nordplus-skipanirnar eru:*

Nordplus Vaksin 1. oktober 2006
Nordplus 1. februar 2007
Nordplus Junior 15. mars 2007.

Meiri fæst at vita á www.ciriusonline.dk/nordplus-sprog ella frá Altjóða Skrivstovan í Tórshavn, tlf. 322065 · e-mail: ask@ask.fo · www.ask.fo





SEV

# MASKINMEISTARI søkist til Elfelagið SEV

Eitt starv sum maskinmeistari á Sundsverkinum, er leyst at søkja til setan frá umleið okt./nov. 2006. Talan er um avloysara fyri maskinmeistara í farloyvi, og verður setanin tí avmarkað at galda til 30. september 2007.

**Starvið:**
Sundsverkið hevur 5 dieselmotrar upp á tilsamans 46,7 MW. Brennievnið er tungolja.
Maskinmeistaraarbeiðið umfatar rakstur og hald av Sundsverkinum, bæði sum dagarbeiði og sum vaktarbeiði uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

Uttanfyri vanliga arbeiðstíð eru altíð tveir maskinmeistarar á vakt á Sundsverkinum, ein vaktmeistari og ein 2. maður á vakt. Lýsta starvið umfatar bæði dagsarbeiði og arbeiði í vaktum uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

Um tann, ið settur verður, hevur fulla maskinmeistaraútbúgving skal hesin kunna tola at verða settur sum 1. maður (vaktmeistari) fyri styttri ella longri tíðarskeið og verður tá løntur sb. 6. lønarflokk.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar við fullari maskinmeistaraútbúgving, t.v.s. víðkað maskinmeistaraprógv ella 3 ára maskinmeistaraskúlaprógv hava fyrimun, men er full maskinmeistarútbúgving tó ikki ein treyt.

**Lønin:**
Starvið er lønt sambært sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið.
Lønin verður ásett eftir starvsaldri frammanundan.
Fyri umsøkjarar við fullari maskinmeistaraútbúgving er lønin sambært 5. lønarflokk.
Byrjunar- og endalønin í 5. lønarflokki er í løtuni netto ávíkavist kr. 23.842,01 og kr. 25.578,08 um mánaðin. Harafturat verður goldið í eftirlønargjaldi tilsamans ávíkavist kr. 2.980,25 og kr. 3.197,26 um mánaðin.

Umframt nevndu løn verða goldin vaktargjøld í tann mun, viðkomandi luttekur í vaktum og møguliga av og á eisini úrtíðarløn.

**Umsóknir:**
Umsóknir skulu saman við prógvum og møguligum ummælum verða send Elfelagnum SEV, Postrúm 319, FO-110 Tórshavn og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi fríggjadagin tann 9. oktober 2006.

**Nærri upplýsingar:**
Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Jákup Sørensen, verksmeistara á Sundsverkinum ella til Bergur Didriksen, deildarstjóra á Maskindeildini, báðir á telefon nr. 346800.

Elfelagið SEV



**Søkt verður eftir snikkaralærlingi at byrja sjótast gjørligt.**

Vit vænta at tú ert í 20 árinum, er ágrýtin og hevur koyrikort.

*Ring á telefon 217082 og hoyr nærri.*

**Snikkaravirkið D.P.R.**
Akranesgøta 4
100 Tórshavn







**Camping.fo**

**Innkallað verður til eykaaðalfund 7. oktober 2006 kl. 15.00**

**Fundurin verður sum vanligt í MBM-húsinum**

**Fundarskrá:**
**Val av nevndarlimum.**



# Verkfrøðingur/ byggifrøðingur

Søkt verður eftir verkfrøðingi, byggifrøðingi ella starvsfólki við líknandi útbúgving ella royndum.

Førleiki at tekna við AutoCAD ella møguliga øðrum CAD forriti er ein fyritreyt. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir innan okkara virkisøki, sum er vatnveiting, kloakering og HVS-installatiónir.

**Martin E. Leo Sp/f**
Ráðgevandi verkfrøðingar · tlf. 311488 · fax 315488
Tórsgøta 24 · 110 Tórshavn · t-post: martin@mel.fo